# Brúkarin

Nr. 160 • mikudagur • 22. august 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Framtíðar brúkarin hugsar politiskt

**Brúkarin í dag hevur bæði rættindi og skyldur. Tí setur ein politiskur brúkari etisk og moralsk krøv til framleiðarar av vørum og tænastum**

*Rigmor Dam*

Tað at brúkarar seta krøv, er eitt fyribrigdi, ið ger alt meira um seg í dag, og sum heilt givið eisini fer at vera ein partur av framtíðini her í Føroyum.

### Leggja trýst á fyritøkur

Umframt at brúkarin í alt størri mun setir krøv til umhvørvisvinarligar vørur, framleiðslu og pakkitilfar, so er eisini eitt annað sjónarmið, sum fer at gera meira um seg, og er tað trupulleikin millum suður og norður í heimsbúskaparligum høpi. Tí, eins og fyri okkum í ídnaðarlondunum, er útflutningur avgerandi fyri búskapin í menningarlondum. Men um vøruframleiðslan er í stríð við grundleggjandi etisk og moralsk virði, kann útflutningurin tvørturímóti forða menningini av landinum.

Tess fleiri brúkarar seta spurnartekin við og krøv til framleiðsluna – um arbeiðsumstøður, rættin til at skipa seg í fakfeløg og at vísa hógv og ábyrgd fyri umhvørvinum – tess størri trýst verður lagt á handlar og fyritøkur, um at kunna geva tær røttu upplýsingarnar – tær, sum brúkarin krevur.

### Hugsan brúkarans stóran týdning

Fyritøkur eru sera viðbreknar mótvegis hugsan brúkarans. Til dømis er vanligt, at fyritøkur í dag gera eitt 'atburðarkodeks' fyri virksemið teirra. Hetta verður mett at geva eina góða mynd av fyritøkuni, sum brúkarin eigur at kunna líta á.

Verður tað alment kent, at ein framleiðari er samvitskuleysur, so er einasta vápn brúkarans upplýsing, soleiðis at fólk sjálvi kunnu velja um tey ynskja at halda fram at stuðla viðkomandi fyritøku.

### Hvør av øðrum liva má

Framleiðarin er bundin av brúkaranum, tí um hann bjóðar eina vøru, sum ikki lýkur krøvini, so velur brúkarin bara onkran annan. Og um fleiri fólk gera tað, verður tað bani framleiðarans. Tí brúkarin er eins eiðrindarleysur í vali sínum, sum framleiðarin er tað í kappingini um vinning. Hetta kenna vit til dømis frá trupulleikanum millum grindadráp og fiskasølu. So – hvør av øðrum liva má – eisini úti á handilsgøtuni.

*Keypivanar tínir kunnu ávirka umhvørvið, støðuna í 3. heiminum og arbeiðsumstøðurnar hjá verkafólki*

## Vitan er besta amboð brúkarans

Sosialurin fer undir nýggjan teig við tíðindum og upplýsing um brúkaraviðurskifti

BRÚKARIN er heitið á nýggja teignum hjá Sosialinum. Endamálið við nýggja tiltakinum verður at upplýsa føroyskar brúkarar um áhugaverdar brúkaraspurningar og tíðindi úr Føroyum og hinum norðurlondunum. Hagani kenna vit eitt ótal av óheftum brúkarastovnum, umhvørvisfelagsskapum og statsligum kanningarstovnum, sum í heilum seta eitt hitt týdningarmesta økið í nýtslusamfelagnum á dagskránna: nevnliga áhugamál brúkarans.

### Stórur tørvur á upplýsing

Tað verður Rigmor Dam, ið fer at leggja teigin til rættis. Hann verður í fyrsta umfari at finna í blaðnum annanhvønn mikudag. Rigmor sigur, at tørvurin á upplýsing og orðaskifti um brúkaraviðurskifti er alstórur í Føroyum. Tað gongur næstan ikki dagur uttan at vit hoyra um onkrar ávaringar ella kanningar, sum brúkarastovnar í hinum norðurlondunum kunngerða. Seinast vóru ávaringar frammi um onkra matolju, sum var undir illgruna fyri at elva til krabbamein, og herfyri vóru tað havragrýn, sum ikki so frægt sum vóru egnað til svínafóður.

## Tryggar leika til børnini

Her eru nøkur góð ráð til foreldur og onnur, sum keypa gávur til børn.

Tað er týdningarmikið at vera fyrivarin, tá leika skal keypast – serliga tá talan er um leika til smábørn.

Keyp leika, sum hóska til aldurin og menningarstøðið hjá barninum. Um støðið á leikanum er ov høgt, er størri vandi fyri at tað brotnar, og tá kann tað lættliga elva til skaða. Barnið verður eisini skjótt troytt av leikanum, um tað ikki megnar at spæla við tað. Sum oftast stendur á leikanum, hvønn aldursbólk tað er ætlað til.

Keyp ikki leika við smálutum til børn undir trý ár. Hjá smábørnum er tað ein partur av natúrligu menningini at kanna heimin við munninum. Í ringasta føri kunnu lutirnir seta seg í hálsin og barnið kvalist.

Leika skulu vera sterk, soleiðis at hjól, eygu, næsar og aðrir smálutir eru væl festir. Kanna sjálv eftir – klárar tú at skrikkja lutirnir av, so klárar barnið tað eisini. Um band er í leikanum, so kanna eftir, at tað ikki er longri enn 22 cm, um okkurt er fest í ella handtak er á.

Leikan lúkar vanligastu europeisku lógarkrøvini um tað er CE-merkt. Um tað ikki hevur hetta merkið, so keyp okkurt annað. Eisini skalt tú krevja, at vegleiðingar og ávaringar eru á einum norðurlendskum málið, sum roknast kann við at tú skilur.

*Kelda: Forbrugerstyrelsen*

## Eldfim barnaklæði

Barnaklæði mugu ikki vera eldfim, og fyrivarni kann takast, longu tá klæðini verða keypt.

Ein forlorin pelsur stóð í ljósum loga, tá ið norska Statens Institutt for Forbruksforskning (SIFO), tók stakroyndir av barnaklæðum herfyri. Úslitið av kanningunum var millum annað, at ein framleiðari tók 2000 barnatroyggjur av søluhillunum.

Tað er bannað at selja barnaklæðir úr serliga eldfimum tilfari, og royndirnar hjá norsku kanningarstovuni skuldu avdúka, um framleiðarar av barnaklæðum virða hetta forboð. Flestu klæðini í royndini luku krøvini, meðan onkur vóru, sum ikki kláraðu tey. Men hvussu kunnu vit vita um klæðini, sum vit ætla at keypa, eru serliga eldfim? Ikki ber til at taka svávulpinnar við til handils og festa í fyri at kanna klæðini.

### Eldfim klæði

Mest eldfimt er lætt og tunt klæði, har væl av luft sleppur ímillum.

– Tunnur vevnaður í bumull og viskosu er sera eldfimur, sigur Anne Bjørnlund frá norsku kanningarstovuni SIFO. Hon hevur drúgvar royndir í arbeiði sínum við klæðum og brunatrygd.

– Akryl er eldfimasta syntetiska klæðið. Tað brennur áðrenn tað smeltar, hóast tað kann tykist torført at kynda. Tá eldurin hevur fest í, brennur harðliga og akryltægrarnar bráðna og dryppa.

Nylon bráðnar, tá tað kemur í samband við hita – tað skríður undan loganum, sum køvist skjótt. Um ein neisti kemur á eina nylonskjúrtu, kemur hol á, og tann sum er í skjúrtuni fær eitt lítið brandsár. Er nylonklæðið harafturímóti blandað við øðrum, so sum bumull, rayon eller ull, kann øll skjúrtan kolast upp innan heilt stutta tíð. Tí er sera torført at kenna brunavandan fyri slík blandað klæði. Er plaggið seymað við bumullstráði, kann hesin gera ilt verri og sammetast við ein veik í einum kertuljósi.

### Tjúkt klæði tryggast

Best er at velja tjúkt klæði, vovið úr ull ella bumull. Hesi lúka oftast krøvini fyri brunatrygd. Bæði ull, silki og mohair eru klæði, sum ikki eru eldfim og sum brenna seint.

Harumframt ber eisini til at vera fyrivarin í gerandisdegnum. Smá børn og livandi ljós eru altíð vandamikið. Tunnir kragar og blondir festa lætt í, tá børnini vøsa og boltrast.

Anne Bjørnlund sigur, at hon altíð hugsar um eldvandan, tá hon skal til onkra samkomu, har opin eldur er.

– Eg fari ikki í eitt tunt sjal, um eg veit at nógv kertuljós verða har. Heldur ikki nýti eg møttil ella poncho, tá faklagonga er um veturin.

*Kelda: Forbrukerrådet í Noregi*

## Svanurin boðar frá góðsku

Vaskievnini við norðurlendsku umhvørvisgóðkenningini Svananum, eru ikki einans mest umhvørvisvinarlig – tey vaska eisini best, vísa kanningar.

Á marknaðinum eru í dag alt fleiri vaski- og reingerðarevni, sum hava uppborið tann heiður, at verða prýdd við norðurlendsku umhvørvisgóðkenningini Svananum. Vørur, sum fáa svanamerkið, skulu lúka ávís umhvørviskrøv, og mugu til dømis ikki innihalda evni, sum eru torfør at bróta niður í náttúruni. Fyri okkum brúkarar ger hetta lívið so nógv lættari, um vit vilja hugsa um umhvørvið; eisini tá ið vit vaska.

### Vaska best og eru bíligast

Ein kanning av ymiskum colorvaskievnum, sum danska brúkarastýrið lat gera í oktober 1999, vísti, at vaskievni við Svanamerkinum, samstundis vóru tey ið vaskaðu best. Harumframt vóru tey bíligari enn onnur vaskievni á marknaðinum.

Í hesum sambandi er vert at geva gætur, at teir størstu framleiðararnir av vaskievnum ikki hava víst áhuga fyri at fáa umhvørvisgóðkenda Svanamerkið á vørurnar – enn.

### LAS – eitrandi fyri umhvørvið

LAS ella linierar alkyl-benzen sulfonatir eru vaskivirkin evni. Í innihaldsyvirlitunum verða tey nevnd anioniskar tensidur – sum er ein bólkur av ymiskum evnum.

Men samstundis er LAS skrásett á yvirlitinum yvir óynskt evni hjá danska umhvørvisstýrinum, tí tað verður ikki brotið niður lívfrøðiliga uttan súrevni, og er eitrandi fyri vatnumhvørvið.

So stórar nøgdir av LAS eru mátaðar í reinsiútbúnaði á reinsiverkum, at avlopsrunan er óegnað at taða bøin við. Í dag eru vaskievni uttan LAS ofta merkt við einum merki, har víst verður á, at evnið ikki inniheldur LAS.

LAS hevur verið nýtt í meira enn 30 ár, og evnið hevur tann, fyri vaskievni, góða eginleika, at tað upployser feitt og skitt, eins og sápa.

### Handilin ger eftir ynskjum keyparans

Um handilin, har tú plagar at keypa ikki hevur vaskievni við svanamerkinum á, so bið tey bíleggja slík. Einans soleiðis kunnu vit brúkarar fáa vørur, sum lúka krøvini um umhvørvisvernd.

*Kelda: Forbrugerstyrelsen*






# MYNDAKAPPING
## Ársins summarmynd 2001

3-arin skipar saman við Atlantic Airways og Sosialinum fyri stórari myndakapping um at finna ársins summarmynd 2001.

Finn tína bestu summarmynd og lat hana inn í 3-aranum ella send hana við postinum.

Vit fara í komandi mikudags-Sosialum at vísa nakrar av innkomnu myndunum.



Í oktober verður avdúkað á framsýning á torginum í SMS, hvør eigur ársins summarmynd. Eisini fáa nr. 2 og 3 ein vinning.

**1. VINNINGUR:**
Vikuskiftisferð fyri 2 til Keypmannahavn, við hoteluppihaldi frá Atlantic Airways



**2. VINNINGUR:**
Minolta digitalt myndatól. Dimage 201, virði 4.995,-



**3. VINNINGUR:**
Minolta Autofokus myndatól. 150AF. Ársins kamera. virði 2.995,-



Seinasta freist at lata myndir inn er:
**LEYGARDAGIN 13. OKTOBER**

BARA 1 MYND Í HVØNN BJÁLVA!!

Kom inn í 3-aran við myndini og hesum lepanum ella send hana við postinum.

Sent hevur, navn:
Bústaður:
Postnr.: Bygd/býur:
Møg. myndatekstur:

☐ Eg vil fegin hava myndina aftur, og havi tí viðlagt ein frímerktan brævbjálva

Send myndina, hendan lepan og frímerkta brævbjálvan til:
**3-arin, postboks 1057, FO-110 Tórshavn**

ATLANTIC AIRWAYS
3arin
Sosialurin